Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Íløga – ikki útreiðsla

## *Oddagrein*

Í EINI áhugaverdari samrøðu í Sosialinum ólavsøkuaftan vísir Hans Holm – fráfarandi lærari í landalæru og náttúrufrøði – á, at útbúgvingarnar í einum framkomnum samfelag eru ikki ein útreiðsla, men ein íløga í framtíðina. Hann upplýsir m.a., at í Japan verður roknað við, at tað tekur bara fimm ár at rinda hesa íløgu aftur. Hetta vita myndugleikar og hetta veit vinnulív. Tí rindar vinnulívið fyri útbúgvingar og hava sínar egnu hægri útbúgvingar.

TEY lond, sum hava ásannað, at fólkið – the human capital – er besta »rávøran«, eitt land eigur, eru millum fremstu lond í heiminum í dag. Afturímóti eru lond, sum eiga rávøru í undirgrund ella í fjøllum, ofta afturúrsigld.

HENDA staðfesting eigur at fáa okkum føroyingar einaferð enn at gera upp við okkum sjálv, tí enn halda mangir føroyingar – eisini á vinstraveingi –, at ov nógvur skúli og útbúgving er óneyðugt í einum fiskivinnusamfelagi. Henda áskoðanin umboðar trongskygni og hevur ikki ásannað, at føroyingar mugu eisini ganga aðrar leiðir, um vit skulu hava eitt betri búskaparligt grundarlag at byggja okkara samfelag á.

VIT eru eitt rávørusamfelag. Stórur partur av okkara rávøru fer framvegis óvirkaður av landinum, hóast 25 ára langar royndir, og drúgvt orðaskifti um hesi viðurskifti, hava roynt at fáa føroyingar at skilja, at vit mugu hagreiða okkara rávøru betur og meira. Hugsið um ótroyttiliga virksemið hjá tí framskygda John Smith – bæði við tekniborð, á skipasmiðjum og í blaðgreinum. Men nýggju og yngru virkisleiðslurnar hava tíbetur ein framskygdan hugburð, so tað er ljós fyri framman – væl og virðiliga.

HARAFTURAT hava vit í dag nógvar ungar og væl útbúnar virkisleiðslur innan aðrar vinnur, sum ásanna, at tað eru møguleikar fyri, at vit eisini kunnu gera okkum galdandi innan nútímans tøkni. Eisini skal Vinnumálastýrið hava eitt herðaklapp fyri, at tað hevur samskipað og latið orðað ein vinnupolitikk, sum er kunngjørdur í fleiri ritum.

MEN vinnupolitikkur og útbúgvingar er ikki nóg mikið. Tað er eisini neyðugt at granska og á hesum øki er eisini ein hugburðsbroyting við at henda í Føroyum. Tað er eydnast fleiri stovnum – t.d. Fiskirannsóknarstovuni og Starvsstovuni – at fáa fatur á útlendskum granskingarpengum og hetta kann verða við til at menna fólk og vinnu.

LANDSSTÝRIÐ ásannar eisini henda veruleika, tí í ólavsøkurøðu løgmans verður staðfest, at »mentan, undirvísing og gransking verða mett sum týdningarmestu íløguøkini hjá føroyska samfelagnum komandi árini«. Og hesum kunnu tey flestu taka undir við!

*Sosialurin*

**Viðmerking:**

# Fiskidagaskipanin fyribeind sum *skipan*

Samb. føroysku orðabókini merkir orðið skipan *»eitthvørt ið er lagt til rættis á ávísan hátt«*.

Tað var júst hetta, sum var ætlanin við fiskidagaskipanini, tá hon var sett í gildi í 1996. Frá at hava havt eina kaotiska kvotaskipan, skuldu vit nú hava eina skipan, í orðsins rætta týdningi, har vinnan skuldi vita hvat hons kuldi hava at halda seg til, ikki bert í løtuni, men eisini framyvir.

Ein partur av hesi skipan var eisini ein skipanarnevnd. Tað skuldi vera eitt arbeiðsbýti millum Skipanarnevndina, sum var mannað við serfrøðini á fiskiveiðuøkinum, og so politiska myndugleikan við tilhoyrandi umsiting.

Serstakliga eftir framløguni av uppskotinum til fiskidagatal fyri komandi fiskiár kann staðfestast, at tað er lítið og einki eftir av nakrari skipan. Politiski myndugleikin hevur yvirtikið stórt sæð allar tær uppgávur sum skipanarnevndin skuldi havt. Tískil eru nú allar funktiónir samlaðar á einum stað, nevniliga fiskimálastýrinum, sum neyvan kann sigast at umboða nakra serfrøði innan vinnu og fiskiskap í mun til hana sum var í Skipanarnevndini.

### Skal nýta eitt ár at seta avtalu á pappír

Hetta stýri er serstakliga merkt av einum heilt sjáldsomum atgerðarloysi. Grundarlagið fyri politikkinum hjá landsstýrinum á hesum øki er ein sokallað »pappírsleys« semja, sum skal hava verið gjørd í samgonguni seinasta heyst. Men enn er ikki so mikið sum ein bókstavur komin niður á pappír! Og samb. nýliga framlagda uppskotinum um fiskidagar fer hetta í fyrsta lagi at henda í heyst, t.v.s. eitt heilt ár eftir at semjan sigst at vera gjørd. Samstundis verður boðað frá, at nú skal samráðast í samgonguni um hvat ið pappírleysa semjan veruliga inniber. Til sammetingar kann verða nevnt, at tann parturin av hesi semju, sum snúði seg um lækking av partafelagsskattinum, var longu avgreiddur í landsstýrinum og løgtinginum í vár.

Men samstundis kann verða sligið fast, at hesin »speedur« í fiskimálastýrinum samsvarar væl við ta fatan og tær royndir, sum vinnan hevur av virkseminum í fiskimálastýrinum yvirhøvur.

Tískil skulu tey stig, sum vinnan hevur tikið í hesum máli, eisini fatast sum úttrykk fyri tí ótryggleika, sum vinnan kennir hvussu áhugamálini hjá henni verða umsitin av politisku leiðsluni og umsitingini.



### Hevur gjørt sær ómak at útihýsa sjónarmiðini hjá Skipanarnevndini

Í seinasta FF-blað er útgreinað nærri sjónarmiðini hjá vinnuni í sambandi við viðgerðina hjá landsstýrinum av tilmælinum hjá skipanarnevndini. Og feløgini, sum vóru umboðað í nevndini, hava annars sent landsstýrinum eitt nýtt skriv, har feløgini hava lýst tær fyritreytir, sum skulu vera til staðar, fyri at vinnan skal meta tað vera grundarlag fyri at virka í Skipanarnevndini.

Men nú uppskotið hjá landsstýrinum er framlagt ber til at staðfesta, at landsstýrið má hava gjørt sær ómak fyri ikki at taka til eftirtektar so mikið sum eitt tað einasta av almennu sjónarmiðunum hjá Skipanarnevndini.

Eitt gott dømi er viðvíkjandi tí sum kallast »líðandi batar í veiðuevnum« í mun til upprunaliga grundarlagið fyri fiskidagaskipanini. Nevndin hevur víst á, at roknast má við slíkum batum, eins og tað má roknast við tí mótsatta, har t.d. friðingar eru gjørdar.

Nevndin hevur sagt, at hon, sum er, ikki hevur møguleika fyri at gera hesar batar í veiðuevnum nágreiniliga upp. Men hon metir, at økt veiðuevni liggja í hvussu er innan fyri teir niðurskurðir í fiskidagatalinum, sum longu eru gjørdir síðan skipanin var sett í verk. T.v.s. fyrst tey 12,5% og síðan 5%.

### Landsstovnur vil ikki samsvara

Nevndin hevur eisini víst á, at ein týðandi orsøk til, at hon ikki er før fyri at gera talið nágreiniliga upp er tann, at almenni stovnurin undir ábyrgdini hjá landsstýrismanninum, Fiskirannsóknarstovan, virkar sum um fiskidagaskipanin als ikki er til, hóast hon upprunaliga var við til at evna skipanina til og tók undir vi henni. Fiskirannsóknarstovan hevur, hóast hon hevur møguleikar til tess og hóast limaskap í nevndini, ikki á nakran hátt verið nevndini til hjálpar við hesi fyri hana uppløgdu uppgávu. Hetta er eisini alment ført fram av formanninum fyri Skipanarnevndina.

Hóast hetta nýtir Jørgen Niclasen í viðmerkingunum



*Óli Jacobsen*

til sítt nýggja uppskot júst »líðandi batar« og »lop í veiðuevnum« sum eina av sínum grundgevingum fyri at minka um fiskidagatalið! T.v.s. at loyvir sær at tileinkisgera sjónarmiðini hjá Skipanarnevndini á hesum øki.

Afturat hesum verða sjónarmiðini hjá nevndini viðvíkjandi umrødda leikluti hjá Fiskirannsóknarstovuni ikki tikin upp á tungu. Tað er nærmast tvørtur ímóti. Landsstýrismaðurin undirstrikar at tey sjónarmið hjá nevnda stovni, sum júst eru merkt av at stovnurin arbeiðir sum um fiskidagaskipanin ikki er til, eru tikin við í hansara meting.

### Skipanarloysi heldur enn skipan

Tískil eru vit við at koma aftur í gomlu sugguna, sum vit komu í við kvotaskipanini. Vinnan kann ikki leggja nakað sum helst til rættis út frá verandi umstøðum, tí hon ikki kann vita, hvat ið kann fara at henda komandi ár, komandi ár aftur osfr.

Samstundis verður grundarlagið tikið undan arbeiðsplássunum hjá fiskimonnum á einum grundarlagi, sum fyrst og fremst er merkt av, at eingin í vinnuni skal fortelja fiskimálastýrinum nakað!

Tórshavn, 31. juli 2000
**FØROYA FISKIMANNAFELAG**
**Óli Jacobsen**



# Nýggjur náttklubbi í Havn

*Leygarkvøldið letur nýggjur náttklubbi upp í Havn við navninum »25:35«. Talan verður um eitt royndarkvøld, men um ein mánaða ella so er ætlanin at hava opið hvørt leygarkvøld. Málið er at fáa hendur á teimum, ið eru ov gomul til Club 20, men ov ung til Kaggan*

RÚNAR REISTRUP

Eftirspurningurin eftir dansistøðum og barrum í Havnini er nógv vaksin seinnu árini. Fyri fýra árum síðan var ikki vanligt at náttklubbarnir í Havn vórðu fullsettir fyrr enn ein góðan tíma áðrenn teir lótu aftur, men nú ber oftast ikki til hjá gestum at sleppa inn í tey best umtóktu støðini eitt leygarkvøld, koma tey langt aftaná midnátt.

Tíðliga uppmøtingin hjá gestunum ger tað munandi meira lønsamt at reka náttklubbavirksemi, og gevur samstundis pláss fyri einum størri útboði.

Leygarkvøldið opnar ein nýggjur náttklubbi, ið ætlandi skal nøkta ein tørv, sum sambært stigtakarunum ikki verður nøktaður í løtuni. Her verður sipað til tey, ið hvørki kenna seg at hoyra til í Kagganum ella í Club 20, sum eru teir báðir størstu náttklubbarnir í landinum.

### Ov gomul og ov ung

Stigtakararnir til nýggja náttklubban ætla fyrst og fremst at leggja seg eftir at fáa fatur á teimum ungu gestunum, sum seinnu árini eru farnir at ganga í Kagganum. Hesin náttklubbi var upprunaliga mest fyri tilkomin, men hevur síðan broytt bæði útsjónd og tiltøk so hann passar betur til yngra ættarliðið. Hetta hevur eydnast væl hjá Kagganum, men stigtakararnir til nýggja klubban siga seg ikki vera í iva um at tað fer at eydnast at draga stóran part av „nýggja klientellinum" hjá Kagganum oman í »25:35«, sum nýggi náttklubbin kallast.

Hin parturin av gestunum, sum »25:35« hevur hug á, eru tey, sum í veruleikanum ikki kenna seg heima í Club 20 og Casablanca, men sum kortini eru har, tí tey ikki hava aðrastaðni at fara, verður sagt.

Navnið avdúkar nokkso nógv um hvønn aldursbólk »25:35« ætlar at fáa inn um dyrnar, men sambært stigtakarunum er tað ikki bindandi, og aldursmarkið er sum á øllum øðrum skeinkistøðum í landinum 18 ár.

### Royndarkvøld leygardagin

Nýggi náttklubbin verður innrættaður í veitsluhøllini í Havnar Klubba. Stigtakararnir hava gjørt avtalu um at langtíðarleiga hølið, og tann avtalan kemur í gildi um ein lítlan mánað.

Komandi leygarkvøld fer »25:35« at vera opin, men so letur hann ikki upp aftur fyrr enn tríggjar vikur seinni. Talan er um eitt royndarkvøld nú leygarkvøldið, og stigtakararnir leggja ikki lok á, at hetta hevur samband við at fyrsta vikuskiftið eftir ólavsøkuna plagar at vera eitt vælmannað kvøld í býnum.

Av tí at talan er um eitt royndarkvøld er ikki so øgiliga nógv gjørt við at broyta veitsluhølið í Klubbanum, men tað verður gjørt seinni, sigur ein av stigtakarunum, Petur Olsen.

Fyri fyrst er bert ætlanin at hava opið leygarkvøld, tá væl fleiri fólk eru í býnum enn fríggjakvøld. Til at draga fólk til nýggja staðið í býnum nú leygarkvøldið, hava teir fingið Ólavur Øster Band at spæla.

Havnar Klubbi hevur ikki annað við nýggja náttklubban at gera, enn at hann leigar hølið út. Men við at hava náttklubban í hesum hølunum, hava stigtakararnir longu tryggjað sær skeinkiloyvi, sum er ein ógvuliga umráðandi partur av náttklubbavirksemi.

# Navnalógin skal broytast

*Átta ára gamla navnalógin, sum av summum verður mett at vera í so víðgongd, skal nú endurskoðast. Spurningurin er, um onnur fyrilit enn bert tey málsligu skulu havast í geyma, tá avgerð um góðkenning av nøvnum verður tikin*

RÚNAR REISTRUP

Navnalógin skal broytast. Tað boðaði løgmaður frá í ólavsøkurøðu síni.

Av løgmannsskrivstovuni, ið umsitur málsøkið, siga tey, at arbeiðið at endurskoða galdandi navnalóg er komið so langt, at í heyst verður klárt at leggja uppskot til lógarbroytingar fram fyri tingið.

Sambært løgmannsrøðuni hevur spurningurin um reglurnar um fornøvn eisini í framtíðini einans skulu grundast á málfrøðilig fyrilit, verið eitt av útgangstøðunum fyri arbeiðinum at endurskoða navnalógina.

Hetta leggur beinleiðis upp til, at reglurnar fyri góðkenning av nøvnum skulu linkast og at listin við gókendum nøvnum helst skal umfata fleiri nøvn enn sum nú er.

### Hørð linja

Í galdandi navnalóg, ið varð samtykt á tingi í 1992, stendur sum einasta treyt fyri at eitt navn kann verða góðkent, er at tað er í samljóði við føroyskar málreglur.

Lógin gevur tó eisini landsstýrinum eina ávísa heimild at geva undantaksloyvi, um so er, at foreldrini at einum barni eru útlendsk. Onnur fyrilit verða ikki tikin, og tað ber til dømis ikki til at uppkalla forfedrar við sama navni, um ikki hetta navn er millum tey viðurkendu.

Nú lógin hevur virkað í átta ár er greitt, at listin við viðurkendum nøvnum, ið varð gjørdur í sambandi við at lógin kom í gildi, aloftast hevur havt seinasta orðið at sagt, tá søkt hevur verið um loyvi at geva børnum nøvn, ið ikki eru viðurkend.

Nógv eru dømini um, at foreldur eru farin uttanlands at doypa børn síni fyri at sleppa uttan um ásetingarnar í navnalógini.

### Nøvn eru orð

Jóhan Hendrik Winther Poulsen var ein av høvuðskreftunum í arbeiðinum at gera galdandi navnalóg. Hann er onga løtu í iva um, at tað eru tey málsligu fyrilitini, ið eiga at liggja sum grund fyri viðurkenning av nøvnum.

– Nøvn eru partur av málinum og eiga at verða viðfarin eins og málið. Tey eru ikki annað enn orð og skulu bendast. Tað setir síni krøv til nøvnini.

– Men nógv nøvn eru innkomin ígjøgnum allar tíðir, og tað er tí altíð ein spurningur um útveljing, tá tú skalt gera ein lista við góðkendum nøvnum, sigur Jóhan Hendrik Winther Poulsen, málfrøðingur.

– Tað kann sjálvandi vera, at vit hava verið ov stívir í okkara útveljing av nøvnum tá. Men tað haldi eg tó ikki sjálvur, sigur Jóhan Hendrik.

### Rætta leiðin

- Nøvn eru full av kenslum og tað er ótrúliga ringt at sigla millum boðar og skerð í slíkum málum. Eg haldi at tann leið, sum vit høvdu valt, var í samsvari við teirri hugsjón, sum var galdandi, tá vit arbeiddu við navnalistanum, sigur Jóhan Hendrik.

Hann fegnast enn tann dag í dag um at tað eydnaðist at fáa eina føroyska navnalóg samtykta. Til fyri átta árum síðan var eingin lóg galdandi á økinum.

Arbeiðið at gera eina slíka byrjaði longu í hálvfjersunum, tá Jóhan Hendrik sjálvur var við í eini trímanna nevnd, ið arbeiddi seg fram til eitt lógaruppskot.

– Men tá ríkisumboðsmaðurin hoyrdi um hetta, fekk hann steðga arbeiðinum við at vísa til, at heimastýrislógin ikki gav landsstýrinum heimild at lóggeva á navnaøkinum, greiðir Jóhan Hendrik frá.

Hetta kom tó í rættlag síðst í 80'unum, og tá fór ein fimmmanna nevnd so undir at gera uppskot til navnalóg.

– Tað bleiv eitt hart stríð yvirhøvur at fáa eina navnalóggávu, og eg fegnist um at tað lukkaðist, tí vit høvdu nógv at vinna inn aftur á navnaøkinum, sigur Jóhan Hendrik Winther Poulsen, málfrøðingur.

Shetland Cruise 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

team 85 · 31 65 11

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



Gisting á hotelli
úr einans ... 864,- fyri hvønn
(í lágárstíð)



Gisting á vallaraheimi
úr einans ... 691,- fyri hvønn
(í lágárstíð)



Privat gisting
úr einans ... 819,- fyri hvønn
(í lágárstíð)

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo